LØGBITI NR. 13

# FYRISITINGARLÓGIN, INNLITSLÓGIN OG DÁTUVERNDARLÓGIN

LÓGARTÆNASTAN
**2. útgáva - oktober 2025**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 13**

# Fyrisitingarlógin, innlitslógin og dátuverndarlógin

Í hesum løgbita verður markamót millum tríggjar løgtingslógir, sum allar eru galdandi fyri almennu fyrisitingina, og sum tykjast at regulera somu viðurskifti samstundis, viðgjørd. Talan er um løgtingslóg um fyrisitingarlóg (fyrisitingarlógin), løgtingslóg um innlit í fyrisitingina (innlitslógin) og løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin). Allar tríggjar løgtingslógirnar eru horisontalt galdandi. Tað merkir, at tær eru galdandi fyri allar myndugleikar í øllum viðurskiftum innan virkisøkið myndugleikans.

Tað er serliga í tveimum førum, at ivi kann vera um, hvørjar reglur eru galdandi í ítøkiligum førum. Hetta er fyri tað fyrsta í sambandi við víðarilatan (víðarigeving) av persónupplýsingum í almennu fyrisitingini og fyri tað næsta í sambandi við innlit.[1]

## 1. Víðarilatan av upplýsingum

*Samanhangurin millum fyrisitingarlóg og dátuverndarlóg*

Fyrisitingarlógin er frá 1993 og er ikki broytt síðani. Í § 27 í fyrisitingarlógini er ein almenn áseting um, nær ein fyrisitingarmyndugleiki kann lata sokallaðar trúnaðarupplýsingar víðari til annan fyrisitingarmyndugleika. Trúnaðarupplýsingar – sum ikki bert fevna um persónupplýsingar, men eisini upplýsingar um løgfrøðiligir persónar o.s.fr. – eru m.a. upplýsingar um ættarslag, trúgv og húðarlit, um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti eins og upplýsingar um heilsuviðurskifti, stórar almannatrupulleikar og misnýtsla av njótingarevnum og líknandi.

Dátuverndarlógin, ið kom í gildi tann 1. januar 2021, er galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum fyri almennu fyrisitingina, undir hesum eisini tá almennir myndugleikar lata persónupplýsingar víðari til aðrar myndugleikar. Dátuverndarlógin deilir persónupplýsingar upp í tveir bólkar; vanligar persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar. Viðkvæmar persónupplýsingar eru allýstar í § 11, stk. 1, og fevnir hetta í høvuðsheitum um somu upplýsingar, sum í fyrisitingarlógini verða kallaðar trúnaðarupplýsingar.

Í viðgerðarreglunum í kapittul 2 í dátuverndarlógini er ásett, nær bæði vanligar og viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast. Hugtakið "viðgerð" fevnir eisini um víðarilatan.

Um virkisøkið er í § 2 í dátuverndarlógini ásett, at dátuverndarlógin er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum um viðgerðin er heilt ella lutvíst elektronisk og um persónupplýsingarnar eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um viðgerðin ikki er elektronisk. Í § 5 í dátuverndarlógini er ásett, at løgtingslógin er galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum sum verður gjørd fyri ein almennan ella privatan dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum er staðsettur í Føroyum, sama um viðgerðin fer fram í Føroyum ella ei.

Tað kann sostatt tykjast, at fyrisitingarlógin og dátuverndarlógin hvør í sínum lagi regulera spurningin um í hvønn mun ein fyrisitingarmyndugleiki kann lata persónupplýsingar – trúnaðarupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar – víðari til ein annan fyrisitingarmyndugleika. Ásetingarnar í báðum løgtingslógunum minna um hvørja aðra og í fleiri førum verður úrslitið tað sama, óansæð hvør lóg verður nýtt, men tað kunnu eisini verða føri við ósamsvari.

*§ 27 í fyrisitingarlógini víkir í flestu førum*
Dátuverndarlógin ásetur, nær og undir hvørjum treytum persónupplýsingar kunnu viðgerast, meðan fyrisitingarlógin alment regulerar málsviðgerð í fyrisitingini við serligum atliti til, hvørji rættindi partar í málum hava.

Viðmerkingarnar til dátuverndarlógina frá 2021, sum er tann nýggjara av løgtingslógunum, taka ikki ítøkiliga støðu til, hvussu farast skal fram í teimum førum, tá tað kann verða ivi um, hvørt fyrisitingarlógin ella dátuverndarlógin skal nýtast.

Í viðmerkingunum til áður galdandi persónupplýsingarlógina er greitt frá, at endamálið við løgtingslógini er at tryggja eina tíðarhóskandi lóggávu, sum er einføld at umsita og greið at nýta umframt at tryggja eina samlaða lóggávu, sum fevnir um alla viðgerð av persónupplýsingum, óansæð um viðgerðin fer fram í tí privata ella almenna geiranum. Nýggja dátuverndarlógin byggir víðari á hetta og hevur til endamáls at tryggja, at verndarstøðið fyri skrásett er nóg gott og tíðarhóskandi, og at tryggja, at Føroyar kunnu fylgja altjóðagerðini og verða góðkendar av ES-nevndini sum trygt triðjaland.

Hetta hevur við sær, at um viðgerð av persónupplýsingum er innan fyri virkisøkið í §§ 2 og 3 í dátuverndarlógini, skal viðgerðin lúka treytirnar í dátuverndarlógini. Hetta merkir, at í tann mun tað er ósamsvar millum dátuverndarlógina og § 27 í fyrisitingarlógini, er tað fyrisitingarlógin sum víkir fyri dátuverndarlógini.

§ 4 í dátuverndarlógini ásetur, at dátuverndarlógin víkir fyri ásetingum um viðgerð av persónupplýsingum í aðrari lóggávu, um ásetingarnar í aðrari lóggávu geva skrásetta eina betri rættarstøðu. Henda áseting hevur ikki við sær, at niðurstøðan verður ein onnur. § 4 snýr seg yvirskipað um, hvørt tað er møguligt í serlóg at hava serligar ásetingar um viðgerð av persónupplýsingum, meðan tað enn er so, at almenna reguleringin av viðgerð av persónupplýsingum er í dátuverndarlógini.

*Virkisøki fyri § 27 í fyrisitingarlógini*
At § 27 í fyrisitingarlógini víkir fyri dátuverndarlógini hevur við sær, at § 27 einans er galdandi í teimum førum, tá viðgerðin er uttan fyri virkisøkið fevnt av dátuverndarlógini. T.e. um talan ikki er um persónupplýsingar ella um viðgerðin av persónupplýsingum ikki er heilt ella lutvíst elektronisk og um persónupplýsingarnar ikki eru ella verða settar í eina skrá.

Av tí at mesta viðgerðin í almennu fyrisitingini í dag fer fram elektroniskt, ella fevnir um upplýsingar, ið eru ella verða settar í eina skrá, er sjálvstøðuga virkisøkið hjá § 27 sera smalt.

Í 2009 varð danska fyrisitingarlógin broytt, soleiðis at § 28, ið svarar til § 27 í føroysku fyrisitingarlógini, vísti til reglurnar í tá galdandi donsku persónupplýsingarlógini. Eftir hetta var heimildin hjá almennum myndugleikum til at lata upplýsingar sína millum – óansæð um talan var um manuella ella elektroniska víðarilatan – løgskipað í persónupplýsingarlógini heldur enn fyrisitingarlógini.

Tann 25. mai 2018 kom nýggja danska dátuverndarlógin (databeskyttelsesloven) og ES-fyriskipanin um dátuvernd (GDPR) í gildi, og danska persónupplýsingalógin varð sett úr gildi. Í tí sambandi varð danska fyrisitingarlógin aftur broytt. Talan var tó bert um fylgibroytingar, soleiðis at § 28 nú vísti til nýggju reglurnar.

Rættarstøðan í Danmark er í dag tann, at víðarilatan av persónupplýsingum millum almennar myndugleikar er løgskipað í donsku dátuverndarlógini og ES-fyriskipanini um dátuvernd, sama um talan er um automatiska ella manuella víðarilatan.

*Serligar ásetingar í fyrisitingarlógini*
Umframt almennu ásetingina um víðarilatan av upplýsingum í § 27 eru serligar ásetingar í §§ 28 og 30 í fyrisitingarlógini um viðgerð av upplýsingum.

Í § 28 í fyrisitingarlógini er ein serlig áseting um savnan av upplýsingum í sambandi við mál, ið verða reist við umsókn, og í § 30 er ein serlig áseting um, nær ein fyrisitingarmyndugleiki hevur skyldu at geva upplýsingar víðari til ein annan myndugleika. Hesar serstøður eru ikki serliga reguleraðar í dátuverndarlógini, og ásetingarnar víkja tí ikki fyri dátuverndarlógini, men eru galdandi við síðuna av.

## 2. Innlit

*Ásetingar um innlit*
Allar tríggjar løgtingslógirnar – fyrisitingarlógin, innlitslógin og dátuverndarlógin – hava ásetingar um innlit. Tað kunnu tí stinga seg spurningar upp um, hvør løgtingslóg skal brúkast í hvørjum einstøkum føri.

*Ásetingar í dátuverndarlógini*
§ 26 í dátuverndarlógini ásetur reglur um rættindi hjá tí skrásetta at biðja dátuábyrgdaran um innlit í viðgerð av persónupplýsingum um viðkomandi, ið dátuábyrgdarin hevur ábyrgdina av.

Sambært § 18 í áður galdandi persónupplýsingarlógini kundi ein og hvør krevja at fáa at vita, hvørjar persónupplýsingar ein dátuábyrgdari viðger, og fáa upplýst m.a. navn og bústað dátuábyrgdarans og endamálið við viðgerðini. Við dátuverndarlógini er hetta broytt, so at tað nú bert er tann skrásetti, ið kann biðja um innlit sambært dátuverndarlógini.

§ 26 í dátuverndarlógini gevur rætt til innlit í upplýsingar um ein sjálvan, sum verða viðgjørdar, umframt innlit í upplýsingar, sum geva skrásetta møguleika at røkja egin

áhugamál. Hetta er t.d. upplýsing um navn og bústað dátuábyrgdarans, endamálið við viðgerðini og hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar.

Ásetingin í § 26 gevur rætt til innlit í *upplýsingar*, sum eru viðkomandi fyri viðgerð av persónupplýsingum. Eftir hesi áseting kunnu einstaklingar ikki krevja innlit í skjøl ella mál, sum eftir reglunum um innlit í innlitslógini og fyrisitingarlógini.

§ 5, stk. 1 í áður galdandi persónsupplýsingarlógini avmarkaði ikki innlit sambært fyrisitingarlógini, innlitslógini ella sambært aðrari lóg um innlit í persónupplýsingar. Hendan ásetingin er ikki førd víðari í dátuverndarlógini. Tað skal tó ikki skiljast soleiðis, at rættarstøðan er broytt. Ein umbøn um innlit eftir fyrisitingarlógini ella innlitislógini skal framvegis viðgerast sambært reglunum í teimum lógunum.

Hetta hevur við sær, at dátuverndarlógin og tann verjan, sum dátuverndarlógin gevur tí einstaka, ikki avmarkar rættin til innlit eftir aðrari lóggávu. Hetta merkir, at metingin, sum verður gjørd í innlitsmálum – um verju av tí einstaka – ikki verður gjørd eftir dátuverndarlógini, men eftir lógini, sum innlitsumbønin verður viðgjørd eftir. Tann verndin, sum dátuverndarlógin gevur einstaklinginum er í ávísan mun endurspeglað í t.d. § 12 í innlitslógini, sum ásetur, at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um upplýsingar um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum.

Samstundis, sum dátuverndarlógin ikki avmarkar innlit eftir aðrari lóggávu, er í § 36 ásett ein røð av frávikum í rættinum til innlit eftir lógini, m.a. kunnu frávik gerast samsvarandi ásetingunum í § 2, §§ 7-11 og § 14 í innlitslógini.

Samanumtikið merkir hetta, at dátuverndarlógin ikki avmarkar innlitið eftir aðrari lóggávu, og at lógin samstundis ikki kann brúkast at fáa atgongd til upplýsingar, sum av røttum eru undantiknar innliti eftir innlitslógini.

*Ásetingar í fyrisitingarlógini*

Fyrisitingarlógin gevur tí persóni, sum er partur í einum máli har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, ávís rættindi. Hetta fyri at røtt avgerð verður tikin, og at einstaklingurin hevur møguleika at røkja síni áhugamál.

Sambært § 9 í fyrisitingarlógini kann tann, sum er partur í einum máli, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, krevja at verða gjørdur kunnigur við skjølini í málinum.

Innlit eftir fyrisitingarlógini er ikki avmarkað til upplýsingar um ein sjálvan, men er breitt galdandi fyri málið, sum avgerð er ella fer at verða tikin í. Hetta merkir, at viðkomandi partur kann fáa innlit í persónupplýsingar um onnur, um hesar upplýsingar eru partur av málinum. Innlitið kann tó avmarkast eftir t.d. § 15 í fyrisitingarlógini, sum ásetur, at rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun, áhugin hjá partinum í at kunna nýta kunnleika til skjøl í málinum til at røkja sín tørv, má metast at eiga víkja fyri avgerandi umhugsni fyri viðkomandi sjálvum, ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum.

*Ásetingar í innlitslógini*
Sambært § 4, stk. 1 í innlitslógini kann ein og hvør við ávísum undantøkum krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans.

Í mun til markamótið til dátuverndarlógina er tað serliga § 4, stk. 2, sum er viðkomandi. Stk. 2 ásetur, at hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, við ávísum undantøkum kann krevja at fáa høvi til, at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi um t.d. umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.

*Vegleiðing*
Í samband við umbønir um innlit hjá almennum myndugleikum, skal dátuábyrgdarin geva sær far um rættin til egið innlit sambært § 4, stk. 2 í innlitslógini. Tá ið dátuábyrgdarin fær eina umbøn um innlit frá skrásetta sjálvum, skal dátuábyrgdarin meta um, eftir hvørjum rættargrundarlagi skrásetti fær betri rættarstøðu. Við hesum verður hugsað um mongdina av upplýsingum, sum skrásetti fær, og ikki í mun til møguligar prosessuellar reglur, undir hesum reglur um gjald fyri avrit o.s.fr. Hevur skrásetti víst til eitt ávíst rættargrundarlag og metir myndugleikin, at skrásetti kann fáa fleiri upplýsingar eftir einum øðrum grundarlagi, t.d. upplýsingar, sum skulu latast eftir § 26 í dátuverndarlógini, skal myndugleikin vegleiða um hetta í samsvari við vanligu vegleiðingarskylduna.

Hetta kann hava við sær, at ein myndugleiki skal geva innlit eftir § 9 í fyrisitingarlógini ella § 4, stk. 2 í innlitslógini, umframt at geva innlit í upplýsingarnar, sum skulu latast í sambandi við innlit eftir dátuverndarlógini.

[1]Um sama evni sí m.a.:
- Løgtingsmál nr. 103/2000; Uppskot til løgtingslóg um viðgerð av persónupplýsingum.
- Fyristingarlóg, Lærubók, Onnur økta útgáva, Fróðskaparsetur Føroya 2012, s. 188ff.
- Uppskot til fyristingarlóg, Løgtingstíðindi 1992, s. 436ff.
- LFF nr. 147 af 9. december 1999 om forslag til lov um om behandling af personoplysninger.
- Betænkning nr. 1500 om udveksling af personoplysninger inden for offentlige forvaltning, København 2008.
- Justitsministeriets vejledning af 12. november 2003 om offentlige myndigheders udveksling af personoplysninger som led i den koordinerede myndighedsindsats over for rockeres kriminalitet.